# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 22.07.2019 kl. 17.30

Á fundi: Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Sten Spange Larsen
Poul Laust Christiansen (fyri Janus Thomsen)
Hans Cecil Poulsen (fyri Niels Olaf Eyvindsson)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi til at taka tvey mál við aftrat – koma á skránna sum mál nr. 10 og 11.

1. **Umsókn um stuðul frá Rørslufelagnum Hvistan.**
   Felagið er áhugafelag hjá teimum, ið íðka frælsan ítrótt og hevur 70 limir í Suðuroynni.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

2. **Umsókn um fíggjarligan stuðul til Parkinsonfelagið.**
   Parkinsonfelagið skipar fyri regluligum fundum kring landið fyri sjúklingum og teirra avvarðandi.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 3.000,-.

3. **Umsókn um stuðul til mentanarkvøld í sóknini.**
   Søkt verður um stuðul til at skipa fyri einum mentanarkvøldi í sóknini.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at játta stuðulsumsóknini, við at vøra verður keypt til tiltakið upp til kr. 3.000,- og at leiga Roynhøllina ókeypis.

4. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Nýggjársnevndini í Hvalba.**
   Møguligur stuðul skal brúkast til keyp av fýrverki, hessjan v.m.
   **Fíggjarnevndin 22.07.2019:**
   Nevndin mælir til at stuðla við kr. 20.000,- eins og undanfarin ár.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

5. **Umsókn um stuðul til eldradag pensjónistanna 2019.**
   Pensjónistafeløgini í Suðuroynni skipa fyri eldradegi á Tvøroyri tann 24. august saman við Landsfelag Pensjónistanna. Tørvurin á stuðli til tiltakið er umleið kr. 25.000,-.
   **Fíggjarnevndin 22.07.2019:**
   Samtykt einmælt at mæla til at stuðla við kr. 3.500,-.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

6. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá TB-flogbólti.**
   Søkt verður um stuðul til kappingarárini 2019/20 og 2020/21.
   **Fíggjarnevndin 22.07.2019:**
   Mælt verður til at stuðla við kr. 3.000,- um árið næstu tvey árini.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

7. **Umsókn um stuðul til Fótbóltsskúlan við Stórá 2019.**
   Eins og undanfarin ár, verður skipað fyri fótbóltsskúla fyri børnum úr øllum landinum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 2.000,-.

8. **Umsókn um stuðul frá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag.**
   Stuðulin, ið felagið fær, fer til ymiskt viðlíkahald av vognum, trygdarútgerð v.m.
   **Fíggjarnevndin 22.07.2019:**
   Nevndin mælir til at stuðla felagnum við kr. 2.000,-.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

9. **Umsókn um stuðul til Rudda Føroyar 2019.**
   Samskipararnir av átakinum Rudda Føroya 2019 skipa fyri stórum ruddingardegi í øllum Føroyum tann 21. september. Søkt verður um, at kommunan kann standa fyri og bera kostnaðin av, at burturkastið verður heintað og burturbeint leygarkvøldið, tá ruddingardagurin er av.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at stuðla átakinum, soleiðis at tey sleppa av við burturkastið.

10. **Umsókn um graviloyvi á matr. nr. 180a/l.**
    Søkt verður um graviloyvi, so tey kunnu fara í gongd við hesum nú í summar.
    **Avgerð:**
    Samtykt varð einmælt at geva graviloyvi, treytað av, at hjáløgdu treytir hjá Jens Chr. Joensen, byggimálsviðgera verða fylgdar og at Tekniska nevnd kemur á staðið, áðrenn byrjað verður.

**11. <u>Umsókn um marknaumskipan av uttangarðspartinum matr. nr. 145a, Hvalba</u>.**

Søkt verður um, at 5 gyllin og 11½ skinn uttangarðs í haganum Norðanskarð, matr. nr. 519, verða løgd aftrat matr. nr. 404a/518 í Sandvík.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan uttangarðs.

**12. <u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.30

Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen Rúni Thomsen Gunnhild Mortensen

Sten Spange Larsen Poul Laust Christiansen Hans Cecil Poulsen